# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

21. februar fingu Gudny og Brian Rasmussen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4750 gr.

24. februar fingu Anna Zachariasen og Søren Rasmussen, Esbjerg, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4170 gr.

25. februar fingu Jóna Maria Malunardóttir og Sámal Edel Kyrrigerð, Norðoyri, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4000 gr.

5. mars fingu Tanja Hansen og John Erik Johannesen, Søldafirði, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3090 gr.

5. mars fingu Anita Heinesen, Skála og Gerhard Hølck Hansen, Miðvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3800 gr.

6. mars fingu Thordis Dahl og Dávid Reinert Hansen, Oyri, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3370 gr.

6. mars fekk Ruth Eyvindsson, Hvalba, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3320 gr.

## Prógv

25. februar hevur Jóan Petur Petersen úr Havn tikið prógv sum sivilverkfrøðingur innan Informatik, á Danmarks Tekniska Universiteti.

## Brúdleyp

Í dag, 12. mars kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Berlina Sólsker og Tummas Martin Anthoniussen, bæði úr Klaksvík. Veitsla fyri innbodnum verður í Skálanum.

Í dag, 12. mars kl. 14.00 giftast í Siloa, Ester H. Hansen, Fuglafjørður og Høgni E. Hansen, Klaksvík. Eftir vígsluna verður móttøka, har høvi verður at heilsa uppá brúðarparið.

Í dag, 12. mars giftast í Ráðhúsinum Svebølle, Anja Winther úr Vági og Flemming Nielsen, Kvanløse. Brúdleypsadr.: Grevinge Knalvej 27, 4571 Grevinge.

## Andlát

2. mars
Niels Persson, Tórshavn, 66 ár.
Jona Dahl, í Vági, 93 ár.

5. mars
Annelena Joensen, Klaksvík, 84 ár.
Erhard Miðgerð í Fuglafirði, 67 ár
Marjun Kallsoy, ættað av Eiði, bús. í Albertslund, 69 ár.

6. mars
Ingi Naresh Petersen, sonur Dagny og Dagfinn Petersen í Norðagøtu, 18 ár.
Napoleon Nolsøe í Trongisvági, vanliga nevndur Pole, 70ár
Súsanna Joensen í Skúgvi, vanliga nevnd Sanna, 91 ár.
Olbana Eiðisgarð á Eiði, 91 ár.
Guttorm Hansen, Guttorm hjá Lamba-Krisjan, Klaksvík, 79 ár.

7. mars
Janus Johnsen, vanliga nevndur Janus í Skúlanum, Kollafjørður, 82 ár.
Anja Svenson, dóttir Nancy Svenson, ættað av Válinum og Bjarka Svenson, 19 ár.

# Edvard Hermansen sjeyti



11. mars fyllir ein kendur hósvíkingur runt. Edvard Hermansen verður sjeyti. Í sjálvum sær er tað ikki sørt av eini andsøgn í tí, at hesin spelkni unglingin longu er sjeyti.

Edvard vaks upp í Hósvík, men fór ungur av bygdini og búði í fleiri ár í Havn. Seinni búsettist hann aftur í heimbygdini og er fallin væl til og er vorðin ein sjónskur partur í bygdarmyndini har norðuri.

Edvard er stak fjølbroyttur og fjølgávaður maður og hann hevur tikist við so mangt, bæði í arbeiðslívi og frítíð. Í fleiri ár arbeiddi hann sum skrivstovumaður á heilsølu og eisini sum sølumaður, hann hevur siglt úti við farmaskipi og var eisini við hvalabáti, tá ið hvalaveiði enn var ein veiði hjá føroyingum.

Eitt megineyðkenni Edvards er, at hann gevst ikki á hondum ella steðgar upp í tí, sum hann fæst við. Altíð eru nýggjar ætlanir í umbúna og hugskotini tróta ikki. At falla í fátt liggur ikki til Edvard, til tess er hann ov glaður fyri lívið og alt tað góða og fjølbroytta, sum tað hevur at bjóða. Tað gav at bíta, tá ið hann komin til eftirlønaraldur aftur leitaði sær út á arbeiðsmarknaðin, tí at har hevði hann enn nógv at lata, kendi hann á sær. Men óvart mundi tað ikki koma á nakran, tí soleiðis er Edvard.

Áhugin fyri føroyskum máli liggur frammarlaga hjá Edvardi og sum hjá so mongum í hansara ættarliði mundi tann áhugin av álvara vakna á Føroya fólkaháskúla, har ið hann gekk eina ferð í fimmtiárunum. Tað er so mangan, at Edvard hoyrist minnast aftur á ta tíðina við gleði og takksemi.

Lyndið er lætt og mangan liggur íspegilin og lúrir við onkrari skemtiligari viðmerking ella einum skálkabrosi. Edvard er tikin úr leikum at seta orð saman og fáa at bera upp á rím. Eyðkend eru hansara beinraknu og ertandi ørindi sum viðmerkingar til mál, sum eru frammi í samfelagskjaki, og hóast tónin kann tykjast argandi, so er tað aloftast við einum undirstreymi av góðsku og virðing, at tað verður borið fram. Edvard er eisini nógv umbiðin at yrkja til eitt nú brúdleyp, føðingardagar ella serstøk veitsluhøvi. Yrkingin er sum ein ítrótt fyri hann, fellur honum eisini so lætt, og hana gongur hann uppí við lív og sál. Hon er jú eisini óloysiliga knýtt at hansara stóra áhuga fyri og vitan um móðurmálið.

Eitt dømi um ungdómliga sinnið hjá Edvardi er, hvussu hann við lív og sál hevur fylgt við sonum sínum í teirra fótbóltsspæli. Tað er neyvan ov nógv sagt, at hann millum lítlan og ongan áhuga hevði fyri tí ítróttinum frammanundan, men tað var so skjótt, at hann eisini hevði vant seg til tað, og hann er fastur fúsur við vøllin, tá ið synirnir venja ella spæla dyst. Honum so líkt er tað heldur ikki sørt, at hann eisini hevur sínar meiningar um tað, sum fyriferst inni á vølli. Soleiðis er Edvard, altíð við í tí, sum hendir og til staðar, har sum hann er. Ongantíð líkasælur um tað, sum fyriferst.

Samfelagsmál hava hansara stóra áhuga, og hann hevur roynst Sjálvstýrisflokkinum hollur stuðul og álitismaður í mong ár.

Barngóður og familjukærur er Edvard sum fáur, og vit eru mong, sum hava notið gott av hesum, gávumildur sum hann altíð er.

Føðingardagin er Edvard saman við konuni staddur í Íslandi á vitjan hjá dóttur og abbabørnum, sum búgva í Grindavík.

Hjartaliga til lukku við tí stóra degnum og bestu ynski um nógv og virkin ár frameftir.

**Z.**

## Dagurin

**12. mars. Grakarismessa**. Til minnis um tann tiltikna pávan, sum fekk navnið Gregorius hin Mikli. Hann doyði 12. marts ár 604. Grækarismessa er ein av teimum døgunum, sum boða várið. Um hetta mundið kemur flytifuglurin tjaldrið aftur, og av mongum verður grækarismessa eisini rópt *tjaldursdagurin*. Grækarismessuhald at fagna tjaldrinum er íkomið í nýggjari tíð.

**13. mars. Macedonus**, deyður umleið ár 300. Tikin av døgum saman við konuni Patriciu og dóttrini Modestu.

**14. mars. Euthycius**, deyður umleið ár 740. Tikin av døgum í Mesopotaniu.


# Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**